Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Gera savn



**Stóra pakkhúsið á Gørðunum í Vági verður nú gjørt til hús, ið skal at rúma ymsum virksemi, m.a. sjósavni
Mynd: D. Olsen**

Í Vági hava fólk tikið seg saman um at varðveita Stóra Pakkhús, ið er ein av bygningunum á Gørðunum.

Fyri tveimum árum síðani var Garðabrúgvin liðugt umvæld og hugskotið um at at nýta pakkhúsið til okkurt skilagott tók seg upp.

Í fjør stovnaðu seks ymisk feløg eitt felag, ið hevur til endamáls at varðveita húsini.

Húsini eru gomul, bygd í 1901, og nógv virksemi hevur verið á staðnum. Men seinnu árini hevur eingin verið um húsini, og tað sæst eftir.

Nevnd hevur seinastu tíðina arbeitt við, hvussu farast skal fram, eftir at nýggja felagið hevur ognað sær húsini.

Sum skilst, er ætlanin at koma so nær tilber aftur uppruna líkinum og samstarvað verður við Fornminnisavnið.

Feløgini, ið hava tikið seg saman, eru ymisk og hava ymisk áhugamal. Tískil verður talan um eini hús, ið koma at rúma nógvum ymiskum virksemi.

Feløgini, ið hava tikið seg saman um felagið Stóra Pakkhús eru Johanna TG 326, Kappróðrarfelagið, Grindabátafelagið, Fornminnafelagið, Nýggjársnevndin og Garðabrúgv.

Ætlandi verða bæði møguleikar fyri fundarvirksemi, veitslum, brúsu og vaskimøguleikar til kappróðrarfólk og ferðafólk, rúm fyri kappróðrarbátum, umframt at sjósavn skal vera í húsunum.

# Tónleikabussur á ferð



***Partur av manningini í Shalder Geo framman-fyri tónleika-bussinum, áðrenn teir hildi avstað mána-kvøldið***

***Mynd: Jens Kristian Vang***

Í eina tíð hava fólkini aftan fyri plátufelagið Tutl arbeitt við at fáa til vega ein tónleikabuss.

Nú er tað eydnast. Hesin skal nýtast til konsertferðir í Føroyum og uttanfyri landoddarnar. Longu mánakvøldið fór Shalder Geo við bussinum við Norrønu avstað.

Bólkurin hevur verið á ferð í Føroyum og hevur m.a. spælt í Klaksvík og á Tvøroyri.

Nú sær skráin soleiðis út: 19/4 Göteborg, Café Hängmattan, Musikens Hus (Svøríki) saman við Anders Hagberg og Lennart Kullgren.
22/4 Alfreds Kro, Kautokeino (Sámaland)
Su 23/4 Alfreds Kro, Kautokeino
24/4 Raahe (Finnland)
25/4 Joensuu
26/4 Helsinki
27/4 Tampere
28/4 Kuopio
29/4 Tallinn (Estland)
Su 30/4 Pärnu

Umframt tónasmiðin Kristian Blak, eru í Shalder Geo Mikael Blak, Høgni Klakstein og Heðin Ziska Davidsen, sum kemur upp í ferðalagið í Danmark.

Á konsertunum í Kautokeino, Joensuu og Helsinki verður Inga Juuso saman við bólkinum við joiki.

Shalder Geo leikar tað, ið verður rópt improvisasjónstónleikur. Hetta er yvir egin verk við einum veti av fólkatónleiki og fólkatónleikur. Grundarlagið er fløgan, ið bólkurin gav út.

Eisini leikar bólkurin annan tónleik eftir Kristian Blak, sum hevur verið virkin tónasmiður síðani sjeytiárini.

Tá bólkurin aftur hevur fast undir føti í Føroyum, eru fleiri spælingar á skránni í heimliga umhvørvinum.

T.d. saman við saxofonleikaranum John Tchicai, umframt at bólkurin fer at leika í Klæmintsgjógv.

- do -

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 18. Apr. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** gardar@oslo.online.no
**Reply to:** gardar@oslo.online.no

TELDU-POSTURIN

# Laksurin er mín!

Pálmasunnudag rann mær í hug eina av søgunum sum blivu lisnar í útvarpinum seinast í sjeytiárunum. Brotið sum kom í mín huga er úr eini av skaldsøgunum hjá Jens Paula Heinesen. Millum okkum smádreingir gjørdist tað eitt satt orðatak at siga ”Róligur, Sámal Mathias, hvalurin er mín!” Hendan leysliga broytingin av røddini í lurtitólinum brúktu vit tá onkur tyktist at taka meir til sín, enn vit hildu vera rættvíst.

Orsøkin til, at hendan søgan kom fram fyri meg aftur, vóru eini tíðindi sum bórust í norsku fjølmiðlunum sunnudagin. Tað var stjórin í norska granskingarráðnum, Lars Aukrust, ið vil hava norðmenn til at ogna sær rættindini til framleiðsluna av laksi. Lars Aukrust meinar, at norðmenn sum skjótast eiga at leggja seg eftir at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu laksurin er uppbygdur og síðani at tryggja sær einkarrættin til laksaílegurnar. Eftir hansara hugsan eiga norðmenn at tryggja sær hesi rættindini, tí Noreg í dag er heimsins størsti framleiðari av alilaksi.

Aukrust-tankin er, at Noreg einaferð um ikki so nógv tíggjuár ikki hevur meir olju og gass at selja, og tá er tað fiskur og fiskaúrdráttur, sum skal tryggja Noreg inntøkur. Aling og vanligur fiskiskapur er í dag næst størsta útflutningsvøra. Olja og gass er nógv tann størsta inntøkukeldan, men longu í dag kunnu serfrøðingar siga, at hendan inntøkan vil minka komandi árini, meðan aling og fiskivinna økja um útflutningsvirði á hvørjum ári.

Lars Aukrust vísir á, at vitanin um laksaíleguna vil vera við til at basa laksasjúkunum, og tann sum situr við rættindunum til ílegu vil hava nógvar trumfir mótvegis kappingarneytum sum Føroyum og Skottlandi. Hugsanin er ikki heilt av leið, tí tað hann her vísir á, er at tað er av stórum týdningi at alararnir í Noregi hava alt at vinna við at tryggja sær hesi einkarrættindini – í kapping við altjóða fyritøkur sum liva av at sita á tílíkum rættindum.

Fyri føroyingar, sum fylgja við í orðaskiftinum um deCode skal sleppa at eiga rættindini til og kunnleikan um arvaeginleikarnar og sjúkurnar hjá føroyingum og íslendingum, er hetta eitt vælkent evni.

Samstundis kemst ikki uttanum, at almennir norskir granskarar í størri og størri mun renna ørindir fyri norska stórkapitalin. Ístaðin fyri at stríðast ímóti eini privatisering av ílegum, kastar hann seg út í privatiseringina og vil hava norðmenn at tryggja sær einkarrætt til ein fisk sum hevur stóran týdning fyri nógv smærri samfeløg í Skottlandi, Írlandi, Føroyum og aðrastaðni.

Lars Aukrust leggur dent á, at laksurin og alifiskur yvirhøvur fær stóran týdning framyvir. Tí meinar hann, at tað er av alstórum týdningi at norðmenn tryggja sær fyrst og fremst laksin sum sín ”úrdrátt”. Hetta merkir sjálvandi, at føroyingar kunnu framleiða laks í framtíðini, men um hetta uppskotið vinnur fram, so skal tann norski laksurin vera fyrstafloks vøran, meðan tann føroyski og skotski laksurin gerst annaðfloks. Hetta verður sum við russiskum kaviari, sum kostar nógv og so øllum øðrum kaviari og rogni í heiminum, sum ikki fær nærhendis sama prís. Norðmenn kunnu vísa á, at teir hava einkarrættin og kunnleikan um laksin, sum føroyingar og aðrir ikki hava atgongd til. Tískil kunnu norskir alarar geva eina trygd, sum aðrir ikki kunnu. Samstundis sum norskir granskarar hugsa slíkar tankar um hvat Noreg eigur at gera fyri at tryggja sær einkarrætt til kunnleikan um ein fisk, so tykist vinnan ikki at hava heilt tær somu tjóðskaparligu kenslurnar fyri ílegu og hvør sum eigur rættindini.

Heimsins størsta alifyritøka, Hydro Seafood, gerst nú hollendsk. Hálvstatliga fyritøkan Norsk Hydro heldur seg ikki hava nóg nógv at vinna innan alivinnu, og hevur tí selt alt Hydro Seafood til Holland og felagi Nutreco. Við í søluni fylgir allur kunnleikin sum Hydro Seafood hevur bygt upp síðani 1969.
So hóast norskir granskarar renna ørindir fyri norska vinnu, so er tað eingin trygd fyri at hesin kunnleiki ikki seinni verður seldur til altjóða fyritøkur. Tá er tað ikki norski staturin, sum fær pengarnar, men partabrævaeigararnir í teimum privatu fyritøkunum og hálvprivatu fyritøkunum.

Ílega er eitt eymt evni, serliga tá ein hugsar um, at her er tað tann sum hevur pengar sum kann knúlva tann sum ikki hevur so nógvar pengar. Norðmenn hava alt ov nógvar pengar, og tað tykist, sum um tað finnast hugsanir í samfelagnum sum siga, at hesir pengar skulu brúkast til at gera norðmenn einaráðandi innan eina vinnu teir ikki eru einsamallir um í dag.

Góðar páskir!

**Jógvan Hugo Gardar, Oslo**




**Quinningin á JARNBARDI takkar øllum stuðlum sínum**



Jannie, Brynhild, Svanna, Súsanna, Rannvá, Eivy, Signhild

**P/f Reyni Service - høvuðsstuðul**

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Hr. Heðin Suni Hansen
Tryggingarfelagið Føroyar
Esab-umboðið
P/F Vita Margarin
Sp/f Føroya Gassøla
P/F Faroe Seafood Prime
The Faroes Partnership
Føroya Sparikassi
Leif Jensen
Sp/f A.M.A.
Sp/f Bakstur
P/F Balslev
P/FVest Pack
P/F Sveipur

Stuðul tykkara hevur gjørt tað møguligt hjá okkum at gerast fyrstu føroysku kvinnurnar, ið luttaka í kappróðrinum á Scillyoyggjunum. Eisini vilja vit takka øllum tykkum, sum í aðrar mátar hava stuðla okkum.

**- Takk fyri**

Sosialurin - 311820

**ALU-FELGUR**



**STÓRT ÚRVAL AV DEKKUM OG ALU-FELGUM**

**P/f Esmar Simonsen**
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo

Sosialurin - 311820

**Skorsteins-sóparin**
**er við til at halda umhvørvið reint**
Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar
**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

**Ljóð-útgerð**
til brúdleyp, føðingardagar o.a. til leigu.
Eisini fæst videokanón og ljós sera bíliga.
**Intro**
v/Dánjal Petersen
Gæsugøta 9
100 Tórshavn
Telefon 22 18 85

Sosialurin - 311820

KONSERT
Rúni Brattaberg, sang
Hans Otto Ehrstrøm, klaver



Skrá:
Winterreise eftir Fr. Schubert

í Gl. Meiarínum
flaggdagin 25. apríl kl. 19.30

í Skúlanum í Trongisvági
hóskvøldi› 27. apríl. kl. 19.30

**Konsertfelagi›**

**SUMMARDEKK**
KUMHO DEKK
EURO Tyfoon
**- ein góð loysn**

Sosialurin - 311820

SpF Teldu Tænastan
www.tt.fo

**GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR. NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI**
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað
**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo

J|Á|S|P|I **KETLAR**
**Teir vælumtóktu ketlarnir** *eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**
**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

**Íslendskur lestrarstuðul**

Íslendska mentamálaráðuneytið bjóðar einum føroyingi stuðul (57.600 ísl. kr. í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum frøðigreinum á heimspekideild Háskóla Íslands undirvísingarárið 2000-01. Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentinum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.
Námið byrjar 1. september og endar 1. mai.
Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 29. mai 2000. Umsóknarblaðið fæst á Setursskrivstovuni.

**Fróðskaparsetur Føroya**
**Setursskrivstovan**
Handan Á 15
100 Tórshavn
tlf. 315302, fax 318929

**Apríl tilboð:**

Bremsuklossar framman

| | |
|---|---|
| Fiesta 1/83 - 12/88 | 340,- |
| Escort 1/86 - 8/90 | 340,- |
| Sierra 8/82 - uttan ABS | 340,- |

Svingarm framman pr. stk.

| | |
|---|---|
| Escort 1/86 - 8/90 | 393,- |
| Sierra 1/83 - | 393,- |

Allir prísir eru við arb. og MVG

P/F Wenzel • Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • Tel. 313873 • Fax 311173
www.wenzel.fo

*Lýsið í* **sosialinum**